**UTTAN ÚR HEIMI**

## Drepa húsdjórini

Myndugleikarnir í Kina hava givið løgregluni boð um at avlíva húsdjórini hjá fólki, sum eru vorðin smittað við lungnasjúkuni SARS.

Heilsumyndugleikarnir bera ótta fyri, at húsdjórini kunnu bera smittuna og smitta onnur, og tí hava teir givið boð um at taka og avlíva húsdjórini. Í Beijing hava løgreglumenn seinastu dagarnar verið og leitað eftir húsdjórum hjá fólki, sum eru skrásett sum SARS-smittað. Eingin veit, um djór kunnu bera SARS-smittuna, men kinesararnir halda, at tað er betur at vera fyrivarin.

Samstundis sum kinesisku myndugleikarnir hava hert átakið ímóti sjúkuni, er fráboðað, at fleiri fólk afturat í Kina, Hongkong og Taiwan eru deyð av SARS.

## Skerja ikki oljuframleiðsluna

Felagsskapurin hjá oljuútflytaralondunum, OPEC, hevur biðið Noreg skerja oljuframleiðsluna til tess at fáa prísin í eina meiri støðuga legu.

Men Noreg fer ikki at gera eftir áheitanini, sigur Einar Steensnæs, oljumálaráðharri. Hann sigur, at norska stjórnin fer at fylgja gjølla við gongdini á marknaðinum, og skuldi tað hent, at prísurin fellur nógv, er stjórnin til reiðar at taka neyðug stig. Tað gjørdi Noreg eisini í 1998 og í 2001, men sum er er eingin orsøk til at taka nakað tílíkt stig, sigur Einar Steenanæs.

OPEC-londini samdust á fundi í síðstu viku um at skerja framleiðsluna tvær milliónir tunnur. Um orsøkina varð sagt, at stigið er neyðugt, tí roknast má við, at framleiðslan í Irak fer í gongd aftur um stutta tíð. Harafturat varð víst á, at síðani kríggið í Irak endaði, er oljuprísurin fallin úr 30 niður í einar 25 dollarar fyri tunnuna.

## Fleiri álop á tíðindafólk

Ein uppgerð hjá felagsskapinum Tíðindafólk uttan landamark vísir, at ágangurin ímóti tíðindafólkum vaks nógv í fjør samanborið við árið fyri.

Sagt verður, at 25 tíðindafólk vórðu myrd í 2002, og at talið á teimum, sum vórðu hótt ella álopin, vaks nógv. Uppgerðin vísir eisini, at 40 prosent fleiri tíðindafólk vórðu sett í fongsul í fjør enn í 2001. Í nógvum londum hava myndugleikarnir nýtt bardagan ímóti yvirgangi sum eina umbering fyri at kúga andstøðuna og tey, sum annars verða roknað sum óheft, stendur í uppgerðini.

Sambært felagsskapinum vórðu 700 tíðindafólk sett í fongsul í 2002, og 127 teirra sita framvegis í fongsli. Minst 1240 tíðindafólk vórðu álopin, hótt ella burturflutt. Tølini í ár verða neyvan stórt betur, sigur felagsskapurin og vísir á, at higartil í ár hava 14 tíðindafólk latið lív, harav tíggju í krígnum í Irak.

## Triðja stjórnin í 30 ár

Í Saudiarabia hevur Fahd kongur skipað nýggja stjórn, men allir teir týdningarmestu ráðharrarnir eru teir somu sum frammanundan.

Abdullah bin Abdul Aziz, krúnprinsur heldur fram sum forsætisráðharri, og flestu av hinum týdningarmiklu ráðharrunum eru eisini úr kongsættini. Teirra millum eru varaforsætisráðharrin, verjumálaráðharrin, uttanríkisráðharrin og innanríkisráðharrin, sum eisini sótu í undanfarnu stjórnini. Fíggjarmálaráðharrin og oljumálaráðharrin halda eisini fram.

Vanliga sita saudiarabiskar stjórnir leingi, og stjórnarskiftið ella-broytingin hesaferð er bert tað triðja seinastu 30 árini.

# Vil hava Tommy Franks fyri krígsbrotsmannadómstólin



*Donald Rumsfeld, verjumálaráðharri saman við amerikanskum hermonnum í Irak. Nú verða teir lagdir undir krígsbrotsverk*

**Ein belgiskur sakførari fyrireikar sakarmál ímóti amerikanska generalinum Tommy Franks, sum verður skuldsettur fyri brot á fólkarættin.**

KRÍGSBROTSVERK
*Árni Joensen*

Belgiski sakførarin er farin undir málið vegna 19 irakar, sum vilja vera við, at amerikansku hermenninir framdu krígsbrotsverk undir krígnum í Irak. Tommy Franks, generalur hevði ovastu leiðsluna av hermonnunum.

- Talan er um eitt serligt mál við serligum prógvtilfari, og eg dugi ikki at síggja, at teir kunnu vísa tí frá sær, sigur belgiski sakførarin Jan Fermon. Tann 13. mai skal hann leggja málið fyri rættin.

Sambært sakføraranum eru tað belgiskir læknar, sum arbeiða í Bagdad, sum hava savnað prógvtilfarið, og eftir tí hava amerikansku hermenninir brotið lógina í seytjan førum. Millum annað hava læknarnir myndir og annað, sum sigst vísa, at amerikanararnir søktu at sjúkrabilum í Bagdad, og at teir skutu eftir óvápnaðum sivilfólki.

Sambært belgisku krígs brotsmannalógini kann dómsvaldið revsa útlendskar ríkisborgarar, verða teir funnir sekir í at hava framt krígsbrotsverk í einum øðrum landi.

Amerikanska stjórnin er í øðini um ákærurnar, og at málið kemur fyri rættin í Belgia. Uttanríkisráðið í Washington hevur biðið belgisku stjórnina forða fyri, at krígsbrotsmannalógin verður nýtt sum eitt politiskt amboð, sum amerikanarar orða tað. Sambært BBC skal amerikanska stjórnin hava hótt við diplomatiskum tiltøkum, kemur málið ímóti generalinum fyri rættin.

Men tað ræðir ikki Jan Fermon, sakførara.

- Hava amerikanarar einki at dylja, eigur tað eisini at hava teirra áhuga, at málið fær eina óhefta viðgerð og hví ikki í Belgia? Ella hava teir okkurt, sum teir vilja dylja og tí royna at hótta Belgia, sigur Jan Fermon.

# Bush hevur vón um frið í Miðeystri

**Amerikanska stjórnin fer nú at leggja størri dent á at fáa frið millum ísraelsmenn og palestinar.**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*

Ísraelsmenn og palestinar fingu fyrradagin ta nógv umrøddu friðarætlanina, sum tann sonevnda Miðeystur-kvartettin, ST, USA, Russland og ES, hava lagt til rættis.

Amerikanski forsetin, George W. Bush, segði í gjár, at hann hevur góðar vónir um, at nakað fer at spyrjast burtur úr friðartilgongdini nú. Bush vísti á, at palestinar hava fingið nýggjan forsætisráðharra, og at talan er um ein mann, sum amerikanarar kunnu samstarva við.

- Mahmoud Abbas er ein maður, sum eg kann samstarva við, og hendan møguleikan fari eg at nýta, segði Bush.

Samstundis varð kunngjørt, at Colin Powell, uttanríkisráðharri fer til Miðeysturs í næstu viku. Har skal hann tosa við teir báðar forsætisráðharrarnar, Ariel Sharon og Mahmoud Abbas.

Serligi Miðeystur-sendimaðurin hjá amerikansku stjórnini, William Burns, fer at vitja tey palestinsku sjálvsstýrisøkini í næstu viku. Eisini hann skal hitta Mahmoud Abbas.

Tað eru tó minni enn so øll, sum halda, at tann nýggja friðarætlanin fer at gera enda á ófriðinum millum ísraelsmenn og palestinar, og summi bera ótta fyri beinleiðis borgarakríggi. Meiri um tað í blaðnum í morgin.



# LANGUR LEYGARDAGUR í miðbýnum



# Stórt felags tiltak í gamla Kommunuskúlagarðinum

**Leygardagin kl. 13.30 byrjar eitt stórt tiltak í gamla kommunuskúlagarðinum í Havn. Felagið Tórshavn og fimleikafelagið Ljósið skipa fyri mótaframsýning, har handlarnir í miðbýnum sýna fram nýggjasta vár og summarmótan**

TILTAK
*Magnus Gunnarsson*

Í sambandi við at langur leygardagur verður í Havn 3. mai, skipa Felagið Tórshavn og fimleikafelagið Ljósið fyri felags tiltaki, sum byrjar kl. 13.30 í gamla kommunuskúlagarði. Tiltakið byrjar við at Brandur Enni syngur, síðan hava handlarnir í miðbýnum mótaframsýning við nýggjasta vár og summarmótanum, har varða sýnd fram klæðir til ung og eldri, nýggjasti hármótin, make-up, prýðislutir, brillur, skógvar o.a. Frásøgumaður verður James Olsen. Ein dansibólkur frá fimleikafelagnum Ljósinum verður eisini á pallinum. Annars verður nógv annað í miðbýnum leygardagin, so sum loppimarknaður, kafé, skreiðibani, fjarstýrdir bátar, fiskidammur, søla av kaffi, køkum, pylsum og øðrum. Kl. 16.00 spælir Havnar Hornorkestur. Handlarnir hava opið til kl. 17.00. Um veðrið ikki verður til vildar, verður tiltakið flutt niðan í Badmintonhøllina í Gundadali.



*Foto og styling: Berit Kloster*